# Føroyar og Bretland samstarv á oljuøkinum

**– Vit kenna bæði fyrimunir og vansar frá eini oljuvinnu og vilja fegnir lata føroyingum burtur av okkara royndum sigur bretski orkumálaráðharrin Peter Hain eftir samrøðu við Anfinn Kallsberg, løgmann**

ALMENN VITJAN
*Jan Müller úr London*

Á vitjan síni í Bretlandi nýtti Anfinn Kallsberg, løgmaður eisini høvi til at støkka inn á gólvið hjá spildurnýggja orku- og ídnaðarmálaráðharranum, Peter Hain. Hann tók við nýggja starvinum, eftir at broytingar vórðu gjørdar í bretsku stjórnini herfyri. Frammanundan var Peter Hain varauttanríkisráðharri. Tann sessurin fór til fyrrverandi orkumálaráðharran John Battle, sum løgmaður eisini vitjaði á ferð síni.

Løgmaður sigur, at tað vóru sera positivar og áhugaverdar samrøður hann hevði við Peter Hain, sum tó varð nakað merktur av at vera nýggjur í starvinum. Men rundan um seg hevði hann fyrrverandi og nýggjar embætismenn, sum hava sera gott innlit í oljumál, sum viðvíkja bæði Føroyaøkinum og økinum vestan fyri Hetland.

– Vit viðgjørdu nýggju vinnu okkara, oljuvinnuna og tað samstarv, sum vil vera rætt og náttúrligt at hava við bretar, her m.a. at venja og útbúgva fólk til nýggju vinnuna og hvat viðvíkur hjálparveitingum av ymsum slag, tá talan er um trygd og umhvørvi, her ikki minst við atliti til



*Løgmaður her saman við bretska orkumálaráðharranum, Peter Hain*

*Mynd Jan Müller*




*Herálvur Joensen, stjóri í oljumálastýrinum her uttan fyri DTI, sum er ráðharrastovan fyri handli og ídnaði, og harímillum oljumálum. Í næstum kema embætismenn frá DTI til Føroya at hava samrøður við okkara embætisfólk um komandi samstarvið*

*Mynd Jan Müller*

dálking í tí stóra havøkinum, sum jú er felags fyri bæði londini. Anfinn Kallsberg sigur, at teir fingu positivt svar frá bretska orkumálaráðharranum um, at teir fegnir vilja samstarva.

Millum málini, sum eisini vórðu umrødd, vórðu møguligir trupulleikar av, at oljufelt kunnu ganga tvørtur undir markið. Bretski ráðharrin greiddi frá 19. útbjóðingarumfarinum í bretskum øki, sum nettupp liggur heilt uppat føroyska markinum. -Vit bóðu tí bretar um at bera so í bandi at hava við í sínum útbjóðingarpolitikki, hvussu vit føroyingar hava disponerað, og soleiðis at man fekk tað mest rationella burtur úr bæði fyri myndugleikar og operatørar í øllum økinum. Hesum váttaði Peter Hain og segði, at tað høvdu teir tikið við í sínum metingum, nú gerast skuldi av, hvørji feløg fingu loyvi at bora og hvar.

Sosialurin skilur, at eini 20 feløg hava boðið uppá 19. umfarið í bretskum øki og at loyvini verða latin rættiliga skjótt. Nógv av feløgunum, sum hava loyvi við Føroyar, hava bjóðað men eisini onnur stór oljufeløg skilst. Tað kann hugsast, at møguligar oljugoymslur, sum feløgini halda seg síggja føroysku megin markið, eisini eru inni á bretskum øki.

Løgmaður sigur, at avtalað varð tættari samstarv millum føroyskar og bretskar embætismenn á oljuøkinum.

### Vilja hjálpa føroyingum

Eftir fundin við løgmann spurdu vit Peter Hain, hvat hann fekk burtur úr. -Eg var sera væl nøgdur við samrøðurnar við Anfinn Kallsberg og hansara fólk. Eg haldi vit hava lagt lunnar undir eitt komandi og gevandi samstarv. Vit í Bretlandi hava nógvar royndir á oljuøkinum og eg skilji eisini væl føroyingar, sum eru eitt sindur óttafullir fyri hesi nýggju og stóru vinnu, bæði tá tað snýr seg um umhvørvið, mentanina, fiskivinnuna og um vanligu siðirnar hjá føroyingum. Tað er rætt at gera brúk av teimum møguleikum, sum oljan gevur, men samtíðis skal man eisini leggja seg eftir at verja tey tjóðskaparligu virðini, og tað er nakað, sum vit stuðla fult út segði bretski orkumálaráðharrin.

Peter Hain sjálvur heldur, at føroyska økið kann vera sera áhugavert í komandi leiting eftir olju og sigur, at bretar vilja fegnir hjálpa føroyingum tøkniliga og á annan hátt. Hann fegnast um, at bretsk feløg hava fingið leitiloyvi. -Vit hava so sanniliga eisini sæð óhepnar avleiðingar av oljuvinnuni og kunnu vit hjálpa føroyingum á hesum øki, so vilja vit tað fegnir.



*Løgmaður og føroysku embætismenninir á fundi í bretska orku- og ídnaðarmálaráðnum. Við endan bretski orkumálaráðharrin Peter Hain*

*Mynd Jan Müller*